Zlatan settur upp á pláss

– Zlatan Ibrahimovic hevur ikki lovað Inter trúfesti, síðani liðið reyk úr Champions League-kappingini, men svenskarin skal minnast, hann er ikki størri enn felagið, sigur Inter-venjarin, José Mourinho, nú tað síðstu vikurnar hevur ljóðað, at Ibraimovic, ið ikki er kendur fyri einki at halda um seg sjálvan, skal vera á veg til spanskan fótbólt. – Zlatan er ein stórur spælari, men einki lið stendur og fellur við einum manni. Inter hevur eina stóra søgu, sum hann er partur av, sigur Mourinho.

13 minuttir prógvaðu virðið

Tá danski landsliðsvenjarin, Morten Olsen, sunnudagin tók út síðstu tríggjar spælararnar til næstu dystirnar í HM-undankappingini ímóti Malta og Albania, var framherjin hjá FC Keypmannahavn, Morten Nordstrand, teirra millum. Og hann skuldi bara brúka 13 minuttir í dystinum sunnudagin ímóti OB, fyri at prógva sítt virði. – Var hann ikki komin inn í tí dystin, er ivasamt, um hann hevði verið úttikin, sigur hjálparvenjarin hjá Morten Olsen, Peter Bonde.

Íslandsdystir okkara

29.07.1930: Føroyar-Ísland 0-1 (0-1)
29.07.1959: Føroyar-Ísland B 2-5 (1-3)
03.08.1962: Ísland B-Føroyar 10-0 (8-0)
19.07.1964: Føroyar-Ísland B 1-3 (0-1)
21.07.1967: Ísland B-Føroyar 2-1 (1-1)
21.07.1968: Føroyar-Ísland B 0-3 (0-0)
12.07.1972: Ísland-Føroyar 3-0 (3-0)
08.06.1973: Føroyar-Ísland 0-4 (0-1)
03.07.1974: Føroyar-Ísland 2-3 (0-2)
23.06.1975: Ísland-Føroyar 6-0 (2-0)
16.06.1976: Føroyar-Ísland 1-6 (1-1)
30.06.1980: Ísland-Føroyar 2-1 (2-0)
01.08.1982: Føroyar-Ísland 1-4 (1-1)
02.08.1982: Føroyar-Ísland 0-4 (0-1)
08.08.1983: Ísland-Føroyar 6-0
01.08.1984: Føroyar-Ísland 0-0
10.07.1985: Ísland-Føroyar 9-0
12.07.1985: Ísland-Føroyar 1-0
24.08.1988: Ísland-Føroyar 1-0 (1-0)
08.08.1990: Føroyar-Ísland 2-3 (1-1)
02.07.1995: Ísland-Føroyar 2-0 (1-9)
27.07.1997: Ísland-Føroyar 1-0 (0-0)
18.08.1999: Føroyar-Ísland 0-1 (0-1)
04.02.2000: Føroyar-Ísland 2-3 (2-1)
07.06.2003: Ísland-Føroyar 2-1 (0-0)
20.08.2003: Føroyar-Ísland 1-2 (0-1)
16.03.2008: Ísland-Føroyar 3-0 (1-0)
22.03.2009: Ísland-Føroyar 1-2 (0-2)



ið í fyrsta altjóða skrásetta lands-arlimur í FSF, men fyrst í 90-unum var

Mynd: FSF

landsliðsfótbólti fram til eftir at Fótboltssamband Føroya varð stovnað í 1979.

Settu sær hægri mál

Síðani FSF var stovnað, hava landsdystir verið spældir á hvørjum ári, tó við undantaki av 1986. Í 80-unum vórðu undan FIFA-limaskapinum í 1988 spældir átta landsdystir ímóti Íslandi, og fyrireikingarnar og úrslitini vóru misjøvn.

Størsta skrædlið var í Keflavík 10. juli 1985, tá ið okkara í regni høvdu trupulleikar at standa á beinunum og løgdu rygg til eyðmýkjandi 9-0 tap. Tveir dagar seinni var liðið umskipað undan uppgerðini í Akranesi, og tað var roknað sum stór uppreisn, at tað eydnaðist at avmarka tapið til 1-0. Íslendingar søgdust einar 40 ferðir at renna seg í hegnisliga settu rangstøðufelluna!

Og sum nevnt, var besta úrslitið í 1984, tá ið Jógvan Norðbúð var landsliðsvenjari. Hann hevði sjálvur – í 1975 og 1976 – sum høgri vongverji verið við til at tapta ímóti íslendingum. Í 1984 royndu Jógvan og hansara menn at fyrireika seg væl, og tað eydnaðist teimum at tryggja Føroyum fyrsta javnleikin nakrantíð ímóti Íslandi. Úrslitið í Gundadali, har tað framvegis varð spælt á eyri og sandi, var 0-0.

24. august í 1988 vóru Páll Guðlaugsson og hansara menn fyri fyrstu ferð eftir FIFA-limaskapin í Akranesi og spældu. Ísland vann 1-0, og tað varð roknað sum sera gott føroyskt úrslit.

Síðani tá hevur tað fleiri ferðir verið tætt við, men tað eydnaðist ongantíð at røkka javnleikinum, sum droymt varð um. Í gjár eydnaðist tað – 70 ár eftir fyrstu fótbóltsvitjanina í Íslandi – at vinna fyrsta sigurin á grannunum fyri vestan. Tað var eitt bragd, og vit mugu staðfesta, at tolin trívst!

Vinardystur: Ísland-Føroyar 1-2 (0-2)

Stórur og søguligur sigur

Mangan hava vit kent okkum snýtt, tá Ísland í evstu løtu er farið avstað við sigrinum. Men í gjár var Ísland ongantíð í nánd av at stjala nakran sigur, og unga liðið hjá Heðini Askham skrivaði tó føroyska fótbóltssøgu í Kópavogi

Føroyskur fagnaður í Kórinn-høllini eftir 1-0 málið. Vinstrumegin Andreas Lava Olsen, Gudmund Nielsen og málskorarin, Fróði Benjaminsen, í miðjuni nakrir skelkaðir íslendingar, og høgrumegin Jónas Þór Næs og Súni Olsen

Mynd: Kjartan Þorbjörnsson/Morgunblaðið

FÓTBÓLTUR

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Longu beinanvegin vóru føroysku spælararnir ágangandi og ídnir, og eingin íslendingur fekk frið at hava bóltin. Her var trýst lagt á beinanvegin, og ætlanin um eitt vælskipað avrik, har dentur skuldi leggjast á at fáa væl av fólki við í álop hvørja ferð, sá út til at eydnast serstakliga væl.

Hugburðurin hevði við sær, at Føroyar í veruleikanum høvdu greiða yvirvág í fyrra hálvleiki, tí hóast íslendingar royndu at søkja at, so hevði føroyska liðið fult tamarhald á støðuni alla tíðina. Og tað var ikki bara í fyrra hálvleiki, at talan var um tamarhald, men allan dystin á tamb.

Símun Samuelsen átti tíðliga fyrstu veruligu føroysku royndina, tá hann sendi eitt langskot beint upp um íslendska yvirliggjaran. Og stutt eftir kom fyrsta ávaringin um, at Føroyar kanska fóru at fáa okkurt burtur úr deyðbóltsstøðum, tá Egil á Bø akkurát ikki fekk kós á skallara við aftaru stong eftir hornaspark.

Málini líktust

Fyrri hálvleikur var næstan hálvrunnin, tá Bogi Løkin setti ferð á í høgru síðu, men var steðgaður, so Føroyar fingu fríspark. Hesum tók Súni Olsen sær av í vanliga stílinum, og inni í brotsteiginum var føroyski liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, hægstur og skallaði bóltin væl niður í handara málkrók. Nú var 1-0 til Føroyar, og gleðin í føroysku andlitunum læt seg ikki fornokta!

Súni Olsen royndi seg tvær ferðir aftrat við skotroyndum nakað seinni, og tá Símun Samuelsen varð feldur stutt uttan fyri íslendska brotsteigin, smekkaði Súni frísparkið hart í kropsskinnið á einum av íslendingunum í múrinum.

Nú nærkaðist hálvleiki, og hóast íslendingar hildu Gunnar Nielsen í føroyska málinum so nøkulunda heitan nú og tá, lá minst líka nógv í luftini, at Føroyar fóru at økja. Og fýra minuttir undan steðginum hendi tað.

Andreas Lava Olsen fór um koll á veg fram í høgru síðu, og enn eina ferð royndi Súni seg við neyvum innleggi í íslendska brotsteigin. Har eydnaðist Andreasi at trýsta Guðjón Árna Antoníusson so nógv, at íslendski debutanturin sendi bóltin í egið mál… So var 2-0!"

Vardu væl

Um seinna hálvleik er ikki so nógv at siga, tí hann var nógv merktur av føroysku leiðsluni. Ísland hevði bóltin nógv, men skapti lítið, og føroyska liðið megnaði at verja væl fyri, so teir avgerandi møguleikarnir ikki komu.

Her ráddi fyrst og fremst um at binda væl fyri, og tað gjørdi liðið eisini so meistarliga, at tá íslendingar í yvirtíðini fingu sítt troystarmál við langskoti frá Jónasi Guðna Sævarssyni, gjørdist tað heldur ikki annað enn til pynt. Føroysku spælararnir hildu skansan, til enski dómarin bríkslaði av.

Unga liðið hjá Heðini Askham stóð soleiðis royndina væl og virðiliga, og hetta var einki minni enn ein stórur og søguligur sigur, sum manslandsliðið tryggjaði Føroyum. Flott avrik, har allir stríddust fyri allar og greiddu setningin til fulnar. Tillukku við tí!

FAKTA um dystin

Vinardystur í Kórinn-høllini í Kópavogi
Ísland-Føroyar 1-2 (0-2)
0-1 Fróði Benjaminsen, 21.
0-2 sjálvmál (Guðjón Árni Antoníusson), 41.
1-2 Jónas Guðni Sævarsson, 91.
Føroyar (4-5-1): Gunnar Nielsen – Jónas Þór Næs, Egil á Bø, Jóhan Troest Davidsen, Einar Hansen – Símun Samuelsen, Súni Olsen, Bogi Løkin, Fróði Benjaminsen, liðformaður, Gudmund Nielsen (Christian R. Mouritsen, 63.) – Andreas Lava Olsen (Páll Mohr Joensen, 82.)
Ísland (4-5-1): Stefán Logi Magnússon – Guðjón Árni Antoníusson, Bjarni Ólafur Eiríksson, Atli Sveinn Þórarinsson, varaliðformaður, Guðmundur Reynir Gunnarsson (Kristinn Jónsson, 76.) – Rúrik Gislason (Mattías Guðmundsson, 81.), Jónas Guðni Sævarsson, Davíð Þór Viðarsson, liðformaður (Guðmundur Kristjánsson, 81.), Eyjólfur Héðinsson (Matthías Vilhjálmsson, 46.), Jóhann Berg Guðmundsson (Óskar Örn Hauksson, 46.) – Guðjón Baldvinsson (Gunnar Már Guðmundsson, 62.)
Dómari: Mike Riley (Ongland)
Linjudómarar: Jóhann Gunnar Guðmundsson & Áskell Gíslason (Ísland)
Fjórði dómari: Þorvaldur Árnason (Ísland)